## Blóðug uppgerð

Í Filipsoyggjunum finnur herurin framvegis fólk, sum vórðu myrd í einum hópdrápi í landspartinum Maguindanao á oynni Mindanao fyrst í vikuni. Í gjárkvøldið hevði herurin funnið 46 lík, og tá vóru 20 fólk ikki komin afturíaftur. Myndugleikarnir halda, at hópdrápið var lið í einari uppgerð um tað politiska valdið í økinum. Millum tey myrdu eru kona varaborgarstjóran og tvær systrar hansara. Gloria Arroyo, forseti, hevur lýst Maguindanao og tveir aðrar landspartar í undantaksstøðu.



## Krígsharrar fyri rættin

Í gjár fór altjóða krígsbrotsmannadómstólurin í Haag undir rættarmálið ímóti tveimum fyrrverandi krígsharrum í Kongo, sum millum annað eru ákærdir fyri álop á sivilfólk, neyðtøkur og fyri at hava brúkt børn sum hermenn. Sambært ákæruritinum stóðu Germain Katanga og Mathieu Ngudjolo Chui á odda fyri einum álopi á eina bygd har norðuri í Kongo í februar í 2003. Álopið kostaði meiri enn 300 mannalív. Teir báðir ákærdu nokta seg sekar og hava sagt seg hava samkenslu við teimum avvarandi.



*Ein fegin og errin Debes Petersen, stjóri í Kemilux, saman við listamanninum, Tróndi Patursson, Johan Samuelsen frá Dugna, Fróða Húsgarð og Kristinu Toftegaard Larsen, leiðari á Dugna*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Kærleikskúla til Kemilux

**Fyri fyrstu ferð er ein kærleikskúla latin einari føroyskari fyritøku, og tað var reingerðingar-fyritøkan, Kemilux, ið fekk fyrstu kúluna**

KÆRLEIKSKÚLA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var ein ovfarin Debes Petersen, stjóri á Kemilux, sum seinasta fríggjadag fekk at vita, at hansara fyritøka var vald út til at fáa fyrstu kærleikskúlu, sum latin er í Føroyum.

Tað er Dugni, ið skipar fyri hesum tiltaki, sum fyri fyrstu ferð er roynt í Føroyum, men sum hevur verið fyriskipað síðani 2003 í eitt nú Íslandi.

Kærleikskúlan verður latin í einum virki, fyri at gera serliga nógv fyri at taka starvsfólk inn við skerdum førleika.

- Eg gjørdist sera rørdur, tá eg fekk hetta at vita, og havi eisini hugsað nógv um hetta til nú, eg fekk kúluna handaða, sigur Debes Petersen.

Hann sigur, at teir hava lagt stóran dent á at taka fólk inn við skerdum førleika.

- Vit hava altíð raðfest hetta sera høgt, og hava eisini havt eitt sera gott samstarv við Dugna í sambandi við fólk við breki, sum hava verið hjá okkum, sigur Debes Petersen.

Hann heldur ikki, at tað finst nøkur umbering hjá nøkrum stovni ella fyritøku fyri ikki at taka fólk við skerdum førleika í starv.

Hesin heiðurin kann eisini hjálpa Kemilux á annan hátt.

- Eg haldi, at hetta kann hjálpa okkum bæði uttanlands, men serliga her heima. Tað kann verða við til at varpa ljós á okkum sum fyritøku og á framleiðslur hjá okkum, sigur Debes Petersen.

### Dámar væl

Fróði Húsgarð, sum er beinleiðis orsøkin til, at Kemilux fekk hendan heiðurin, dámar væl arbeiðið.

- Jú, tað dámar mær væl. Tað eru sera fittir starvsfelagar, sum eg arbeiði saman við, sigur hann.

Hann hevur nú arbeitt har í hálvtannað ár.

- Eg byrjaði hjá ALV, sum nú eitur Dugni, og tey hjálptu mær so at koma út á Kemilux at arbeiða, sigur Fróði Húsgarð.

Hann tekst mest við at tappa sápu í dunkar og at klistra etikettir á framleiðsluna. Og hann er eisini sera fegin um heiðurin, sum arbeiðspláss hansara hevur fingið.

- Eg haldi tað er ótrúliga stórt, at Kemilux hevur fingið hendan heiðurin, sigur Fróði Húsgarð.

SINCE 1888
Föroya Bjór

## Maskinmaður til P/f Föroya Bjór

Vit søkja eftir einum maskinmanni at byrja 7. desember 2009.

Tann, ið settur verður, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hevur ábyrgd av viðlíkahaldi og driftsoptimering av øllum maskinum á virkinum.

Løn og setanartreytir verða ásettar eftir nærri avtalu við viðkomandi fakfelag og leiðsluna.

Starvsstaður er bryggjaríið í Klaksvík.

Umsóknir við avritum av prógvum og viðkomandi skjølum kunnu sendast við vanligum brævi til Föroya Bjór, postsmoga 4, FO-710 Klaksvík, ella við teldubrævi til simun@foroyabjor.fo. Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. november 2009.

Um fleiri upplýsingar ynskjast um starvið, kunnu áhugaði venda sær til Símun Gullaksen á telefon 217055 ella 475454.

www.foroyabjor.fo